# Eitt meskamát og annað

## Aberdeen trolarin Starwood var tikin tríggjar ferðir innan fyri 5 mánaðir frá september 1978 til februar 1979, tvær ferðir av Tjaldrinum triðju fer av Ólavi Halga

Týsdagin 19. september kl 16.00 1978 fór kanningarlið av Tjaldrinum umborð á skotska trolaran A 431 Srarwood at kanna veiðu og reiðskap. Trolarin var tá staddur á Munkagrunninum . Eftirlitsmenninir komu eftir, at veiðan var í lagi, men at meskarnar ikki stóðu mát. Meskarnir í posanum vóru úr 123 mm upp til 132 mm. Minst loyvda meskavídd var 135 mm. Kanningarleiðarin Levi Christiansen legði úrsliti av kanningini fyri skiparan á Tjaldrinum, Kaj P Mortensen, at taka støðu til. Kaj skipari tók avgerð um at handtaka Starwood og føra hann til Havnar. Hann gav nú kanningarleiðaranum boð um at leggja tað fyri skiparan á Starwood, Ronald Gardner. Skiparin játtaði beinanvegin at fylgja við til Havnar. Kaj gav eisini boð um at teir 3 eftirlitsmenninir skuldi vera verandi umborð á Starwood og ansa væl eftir, at ongin gjørdi nakað við troli. Klokkan 18.25 var ferð set á ímóti Havnini, har bæði skipini komu mikunáttina klokkan 00.45

### Rættarfundurin

Mikudagin 20. september klokkan 10.00 var rættarfundur settur í dómhúsinum í Havn. Skiparin á Starwood segði seg verða ósekan í ákæruni , men hann viðgekk, at meskar vóru máldir, sum vóru millum 123 og 135 mm. Hann segði eisini, at meskar vóru máldir, sum vóru 140 mm.
Skiparin segði, at hann ikki sjálvur hevði mált meskarnar, hvørki áðrenn teir fóru úr Aberdeen ella á túrinum, sum hevði vart í 4 dagar
Verjin kravdi, at posin var máldur umaftur, meðan rætturin var hjá, tí tað var ilt at tolka orðið øðrvísi. T.v.s. manningi á Tjaldrinum hevði trýst minni á mátiskeiðina en skiparin. Verjin vildi eisini, at trolið bleiv mált eftir NEAFC lógum, sum eru 5 kg-trýst, men hetta var kortini ikki gjørt, tí hesar lógir vóru ikki galdandi í Føroyum tá.

### Rætturin kannaði trolið

Farið var síðani útum Dómhúsið, har trolposin lá, og var hann síðani kannaður meðan rætturin var hjá. Mátingarnar, sum rætturin gjørdi, góvu kortini sama úrslit sjálvt um teir royndu bæði við skeiðini hjá Tjaldrinum og skeiðini sum skiparin á Starwood hevði. Skeiðin hjá skiparanum á Starwood var kortini størri enn skeiðin hjá Tjaldrinum, sum var

135 mm.
Verjin førdi fram eftir mátingina, at tað vóru bert fáir meskar, sum vóru minni en loyvda víddin. Hetta kundi millum annað komast av, at framleiðslufeilur var í trolinum, ella at bøtt var í ringum veðri og kulda.
Klokkan 14.00 sama dag fall dómurin og var skiparin dømdur at gjalda 20.000 kr. í bót og missa ólógliga posan umframt at gjalda sakarmálskostnaðin . Veiðan kom ongantíð til viðgerðar undir sakarmálinum, tí trolarin hevði bert fingið einar 12 kurvar, tá hann var tikin.
Skiparin hendan túrin Ronald Gardner var vanliga stýrimaður umborð á Starwood hann venda vit aftur til.

## Starwood verður tikin aðru fer

Mánadagin 16 oktober klokkan 16.00 fór kanningarlið av Tjaldrinum aftur umborð á Starwood at kanna veiðu og reiðskap Starwood var tá staddur 15 fjórðingar eystur úr Fugloynni, og komið var eftir, at meskarnir vóru ikki í lagi, og fekk Starwood boð um at fylgja við til Havnar, har bæði skipini komu sama kvøld klokkan 20.30

## Rættarfundurin

Sakarmálið móti skiparanum kom fyri í Føroya rætti týsdagin 17. oktober, har frágreiðing var givin av skiparanum sjálvum og stýrimanninum umframt umboðsmanninum hjá Wood-reiðaninum í Klaksvík og stjóranum í pf. Vónini í Fuglafirði.
James Hird skipari greiddi frá at hann hevði júst haft feriu, tá Starwood var tikin 20. september og fingið bót. Táverandi skiparin, Ronald Gardner, hevði siglt sum stýrimaður á Starwood umleið eitt ár, og var eisini við henda túrin í gamla starvi sínum sum stýrimaður.
Hendan túrin fór Starwood úr Aberdeen 5. oktober og eftir áheitan frá reiðarínum bílegði skiparin 2 trolposar frá umboðsmanninum í Klaksvík. Reiðaríið vildi við hesum sleppa undan trupulleikum og tryggja sær at fáa trolposar við lógligari meskavídd. Trolarin hevði ongar trolposar umborð, tá hann kom til Føroyar.
Skiparin segði, at hann mátti bíða í Klaksvík til leygarkvøldið 7. oktober, áðrenn báðir trolposarnir kundu latast, og hann hevði biðið pf Vónina um at veita trygd fyri, at meskavíddin var 135 mm. Seðlar við hesum mátum vórðu lagdir fram í rættinum sum skjalprógv. Sjálvur hevði skiparin kanna meskavíddina í Klaksvík meðan troli var turt, og meðan umboðsmaðurin Kristin Joensen var hjástaddur og frá honum fekk hann at vita, at hetta vóru somu trolposar, sum føroysku trolarinir nýttu. Skiparin greiddi víðari frá, at hann ikki sjálvur hevði hoyrt um, at nakar føroyskur trolari var tikin fyri at hava fiskað við

troli við ov smáum meskum, so hann kendi seg tryggan við at nýta hesar báðar trolposar, sum hann eisini sjálvur hevði mált at verða135 mm.
Hann førdi fram, at í gjár var annar av trolposunum hjá Starwood kannaður av tveimum monnum frá Tjaldrinum, meðan hann sjálvur var hjástaddur, stutt eftir at posin varð hálaður inn. Tølini sum stóðu í rapportini frá Tjaldrinum, og sum vóru løgd fram í rættinum, vóru helst røtt, segði James Hird, men hann kundi ikki taka undir við mátanum menninir av Tjaldrinum nýttu til mátingina, tí teir nærmast hildu mátiskeiðini, og førdu hana ikki inn í meskan. Sjálvur trýsti hann ikki, tá hann máldi, men syrgdi fyri, at máliskaiðin er inni í meskanum, tá mált var.

**Mátar meskarnar hvønn dag**
Ronald Gardner stýrimaður greiddi frá, at hann hvønn dag sjálvur hevði eftirhugt trolposan, mált nógvar meskar meðan trolið var vátt og hevði bert mált meskar uppá minst 135 mm , men fleiri, sum vóru yvir hesa støðd. Hann var til steðar, tá menninir av Tjaldrinum gjørdi mátingarnar dagin fyri,men hann var ikki samdur í teim nevndu mátiúrslitunum, við tað at hann visti til, at hann hvønn dag undir mátingunum var komin fram til at trolposin hevði lógliga meskavídd

**Meskarnir í lagi**
Kristin Joensen greiddi frá, at hann hevði verið umboðsmaður fyri reiðaríið hjá Starwood í 22 ár, og at hann av skiparanum var biðin um at skaffa 3 trolposar harav tann eini skuldi vera til trolaran Japonicu. Hann hevði sjálvur ringt til Olaf Olsen, stjóra á Vónini og bílagt posarnar og hevði greitt frá teimum trupulleikum skotsku trolararnir høvdu havt, og hevði sagt, at teir skuldi standa 135 mm mátið. Hetta góðtók Olaf Olsen samstundis sum hann legði aftrat, at Vaktar og Bjargingartænastan plagdi at máta meskarnar á trolinum hjá teimum, og hevði funnið tað verða í lagi
Kristin Joensen hevði biðið um ein seðil sum vísti meskavíddina. Hann skuldi fylgja við trolposanum, og tað var sami seðilin, sum varð vístir fram í rættinum. Hann hevði verið til steðar, tá posarnir vórðu latnir 7. oktober og tá sá skiparan, at allir 3 posarnir høvdu 135 mm.

**Fáa sjálvt netið úr Íslandi og Danmark**
Olaf Olsen greiddi frá at hann hevði arbeitt við trol í mong ár, bæði sum maður og sum skipari, til hann nú var stjóri fyri pf Vónina í Fuglafirði. Virkið fær frásøgn um broytingar í reglunum um tey ymisku trolini í góðari tíð,so teir ikki hava ov nógv liggjandi.Hann hevði ikki áður verið úti fyri trupulleikum ella klagum í samband við meskavíddirnar, og hann segði, at virkið letur góð 60% av teim trolum, føroysk skip nýta, og góð 80% av 135 mm trolunum, brúkt vera av føroyskum fiskiskipum.

Fyri 2-3 vikum síðani vóru 3 menn av vaktarskipinum Dagstjørnuni á vitjan á virkinum í Fuglafirði, og hann hevði tá biðið teir um at kanna serliga 135 mm trolini. Hann hevði tá sæð, at mátihátturin hjá manningini á Dagstjørnuni og honum var tann sami. Meskavíddin var sum hon átti, at hann helt ikki, at nøkur meskavídd var undir tí loyvda.
Olaf Olsen greiddi frá um netatilfarið, at teir ikki riða netini sjálvir, men fingu netastykkini maskinrudd úr Íslandi og Danmark og gjørdu tey tey síðani til. Í dag innflyta teir einans trolnet, ið er framledd av polyethylen, tí á trolvirkinum hava teir tær royndir at hetta tilfar ger at meskarnir í brúki togna 5 til 10 % meðan nylon tódnar. Trolposarnir sum latnir vóru til Starwood, eru eins og teir til føroysku trolararnar úr polyethylen.
Tá íð hann varð spurdur um hvussu tað bar til at Tjaldrið hevði mált meskar undir loyvdu víddina í trolposanum frá Vónini svaraði Olaf Olsen, at tað einans kundi stava frá nýtta mátingarháttinum, sum fyri hann at síggja ikki svaraði til mátan, teir á Dagstjørnuni nýttu.

**Trolposin mátaður**

Rættarfundurin varð síðani slitin eina løtu, meðan farið var útum at máta posan hjá Starwood, sum sjóverjan kom við í einum lastvogni. Trolposin varð síðani mátaður bæði av monnum av Tjaldrinum. James Hird skipara á Starwood: Monnum frá Marinustøðini og øðrum. Mátingarnar vístu, at summar meskar ikki stóðu mát.
Spurdur um hvat hann hevði at siga til hetta svaraði Olaf Olsen, at tað fyrikom honum,at trolið hevði tættari meskar enn vanligt.

**Fyriskrivaðu reglurnar mugu fylgjast**

Undir dómsviðgerðini førdi ákærarin Frants Cohn fram, at óansæð hvør íð hevði mált trolposan, so hevði úrslitið verið, at meskarnir vóru undir 135 mm, og tá uppmátingin verður gjørd, so mugu fyriskrivaðu reglurnar um trýst av máliskeiðini vera fylgdar. Einasta í er nýtt í hesum er, at bretski skiparin fyri fyrstu ferð hevur keypt trolposan í Føroyum, og roknaði hann tá við at alt var í lagi . Hetta er alla æru vert, men tað frítekur ikki skiparan fyri ábyrgd av, at meskavíddin skal vera tann, sum lógin fyriskrivar. Ákærin helt ikki, at hetta málið skilti seg út frá teim sakum, har skiparin hevði víst til,at troli var bretskt.

**Umganga ikki lógina**

Verjin Halgir Winther Poulsen kravdi frífinning av skiparanum. Hetta reiðaríið hevði verið úti fyri nógvum trupulleikum viðvíkjandi fiskiskapi í føroyskum sjógvi av trolposun, og frá tá av høvud teir roynt at tryggja seg við at bíleggja og keypa føroyskan trolposa, nágreiniliga sama slag sum føroysku trolararnir nýttu og hagartil var ongin føroyskur trolari tikin og dømdur fyri at hava ov smáar meskar. Starwood hevði haraftrat gjørt dagligar mátingar av meskavíddini so tað mátti haldast at vera óhugsandi, at bretski trolarin royndi at umganga lógina við at klípa nakrar millimetrar av loyvdu meskavíddini.

Hann helt skiparan hava verið í góðari trúgv, tá ið hann nýtti henda trolposan, og hann hevði ongan menniskjuliga grund til at kenna seg ótryggan.Mátingin hevði kanska verði ymisk, og Olaf Olsen hevði eisini mált onkran meska til 130 og 132, men so sanniliga eisini til 140 mm. Men hví ikki finna fram til ein tryggan máta við loddum í skeiðini?
Um dómur fall í hesum máli, meðan eingin føroyskur trolari við sama slag reiðskapi enn er ákærdur, so er talan um mannamun segði verjin.

**Eingin bót**

Dómur fall í málinum klokkan 18.30 sama kvøldið og hann var soljóðandi:
Thi kendees for ret:
Den James Hird forskyldte bortfalder.
Den af tiltalte trawlpose konfiskeres.
Tiltalte bør betale sagens omkostnininger, herunder 1500 kr i salær til den beskikkede forsvarer, advokat Halgir Winther Poulsen.
Jacob Leth sum hendan dag sat í dómarasætinum, segði sum grundgeving fyri dómin, at rætturin finnur prófførsluna sum førd hevur fram, harundir uppmátingarnar, rætturin hevur gjørt, at leggja til grund, at skiparin á Starwood undir fiskiskapi á føroyskum sjóøki hevur nýtt trolposa við meskavídd minni enn 135 mm. Hann hevur eftir hesum forbrotið seg sum í ákæruskrivinum ført fram.
Men við fyriliti til, at ákærdi hevur keypt nýta trolposan í Føroyum hjá veitara, sum selur meira enn 80% trolposunum sum føroysk skip nýta, at hann hevur fingið garantiváttan frá leverandørinum at meskarnir eru 135 mm at leverandørurin ongar klagur hevur fingið ella haft aðrar trupulleikar í samband við seldu trolposarnar at manningin á vaktarskipinum Dagstjørnuni hevur kannað og funnið trolposarnar á goymsluni hjá leverandørinum, pf Vónini, at vera lógligar, og tað ikki sæst, at ákæra er reist móti føroyskum trolaraskiparum fyri at hava nýt trolposar við ov smáum maskum, finnur rætturin at her liggja fyri so serligar linnandi umstøður, at revsingin sambært gr 85 í revsilógini fellur burtur.
Konfiskationspástandurin hjá ákærumyndugleikunum veðrur tikin til fylgju, soleiðis at trolposin sum nýttur er undir fiskiskapi 16 oktober 1978 verður konfiskeraður, segði dómarin at enda.

**Starwood verur tikin triði fer**

Um middagsleiti hósdagin 22. februar 1979 kom sjóverjuskipið Ólavur Halgi fram á Starwood meðan hesin royndu á eini stongdari leið norðanfyri.
Starwood fekk boð um at hála og fylgja við til Havnar har bæði skipini komu um nátturðatíð sama kvøld, og kom málið fyri í Føroya rætti seinni sama kvøld.
Skiparin á Starwood James Hird segði í rættinum, at teir vóru farnir úr Aberdeen týsdagin, og komu á fiskileið einar 23-24 fjórðingar í ein landsynning úr Fugloynni Mikukvøldið.
Hann segði seg kenna reglurnar fyri fiskiveiðu við Føroyar, og ætlaði at byrja túrin á einum øki sum bretar nevna fyri” Holið”Hann visti eisini at “Holið” var rættiliga nær við

stongda økið
Teir høvdu frammanundan haft tvey hál, men ikki fingið nakað serligt av fiski, og tí ætlaði hann at rúma haðani, men av tí at ofta fekst eitt gott hál í skýmingini, skuldu teir gera eitt hál aftrat.
Skiparin segði víðari, at hann tørnaði inn um 10-tíðina fyrrapartin hósdagin men frammanundan hevði hann sagt tveimum av dekkarunum hvussu teir skuldi sigla. Tá hann tørnaði inn, sigldu teir í ein útnyrðing, og hann segði dekkarunum á hvørjari DEKKA-leið teir seinast skuldu venda .Tað var væl burtur frá syðru linjuni á kassanum
**Ólavur Halgi kemur**
Hann var vaktur aftur, og fekk at vita, at Ólavur Halgi var tætt við, og yvir VHF- sendaran fekk hann at vita frá Ólavi Halga at teir trolaðu 2 fjórðingar inni á einari stongdari leið. Skiparin segði at enda,at teir vóru við at venda, tá Ólavur Halgi kom, og hevði hann sostatt trola á einum friðaðum øki, men at hann var 1til 2 fjórðingar inni á stongdu leiðini visti hann ikki.
**Ymiskar mátingar**
1 stýrimaður á Ólavi Halga Kurt Joensen segði í rættinum at fyrsta peilingin sum teir tóku av Starwood vísti at teir trolaðu meir enn 2,5 fjórðing inni á stongdu leiðini. Løtu seinni var aftur ein peiling tikin og tá var trolarin umleið 2 fjórðingar norðanfyri sunnaru linjuna av økinum, og sigldi hann tá nøkulunda beint suðureftir.
Klokkan 12.00 var Ólavur Halgi hjá Starwood, og vísti peilingarnar tá at trolarin var 2 fjórðingar inni á stongdu leiðini 16 fjórðingar úr Bispinum.
Haraftrat hevði manningin mált positiónina við Dekkaunum á báðum skipunum,og tey vístu líka.
**Dómurin**
Málið var síðani tikið upp til dóms .Skiparin á Starwood James Hird var dømdur at gjalda 60.000 kr í bót, og at missa veiðu og tann tann reiðskapin sum var nytur, tá hann var tikin. Veiðan og reiðskapurin veiðan var gjørt upp til góðar 50.000 krónur
Sama dag sum dómurin fall fylti James Hird skipari 52 ár so sigast kann at hetta var ein sera óheppin føðingardagur hjá honum.

Heimildir
Dimmalætting
Skipsdagbøkur av Tjaldrinum
Og Ólavi Halga